tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 92 Leygardagur 13. mai 2000 74. árgangur www.sosi... ...r. 10,00



## Halgisberg lopið

Á fyrsta ferðafólkatúrinum undir Vestmannabjørgunum varð staðfest, at ein stórur biti av Halgisbergi í Lítlabergsgjógv er rapaður í havið Síða 7



## Tríggjar metrar upp á tíggju ár

Summi træsløg klára seg betur enn onnur, men vestmenningar vilja varðveita fjølbroytni í viðarlundini

Síða 8

# Í uppisetri við nøvnum



Bóndahjúnini í Heimistovu á Viðareiði hava ikki ligið sjóvarfallið av sær, tá talan er um at seta arvingar í verðina. Eftir átta árum fingu tey seks børn, og fyri kortum kom eftirnølarin, sum enn ikki hevur fingið navn

Síða 20-21

## Jugoslavarnir við móti GÍ

Jugoslavarnir, sum KÍ í nakrar mánaðir hevur arbeitt við at fáa til landið, eru nú ávegis

Jákup Mørk

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar, frættu vit, at teir báðir jugoslavarnir, sum KÍ hevur havt í hyggju at styrkja hópin við, nú eru ávegis til Føroya.

Svend Jacobsen, formaður í KÍ, váttar fyri Sosialinum, at alt pappírsarbeiðið nú er fingið frá hondini, og at um alt gongur eftir ætlan, verða báðir leikararnir í Klaksvík leygarkvøldið. Teir kunnu sostatt verða við í dystinum móti GÍ sunnudagin.

**Hava bíðað**

Tað eru annars úti við tveir mánaðir síðani tað frættist, at KÍ hevði í hyggju at styrkja sær um hópin við útlendskum leikarum. Talan skuldi verða um ein áleypara og ein málverja, sum ætlandi skuldu tippa holini eftir Kurt Mørkøre og Stephen Boyle.

Upplýsingarnar, sum vit tá fingu, hava nú víst seg at vera rættar, og er talan um 32 ára gamla málverjan, Zoltan Kujundzic, og 22 ára gamla áleyparan, Srecko Milicevic.

**Fimm útlendingar**

Við nýggju leikarunum hevur KÍ fimm útlendskar leikarar í hópinum, sum frammanundan telur pólverjarnar, Andrzej Pacek og Marek Wierzbicki, umframt leikandi venjaran, Tomislav Sivic. Hóast markið hjá FSF er ásett til fýra útlendskar leikarar, so er hetta ikki nakar trupulleiki hjá klaksvíkingum. Bæði Tomislav Sivic og Marek Wierzbicki hava nevnliga verið somikið leingi í Føroyum, at teir í fótbóltshøpi verða roknaðir sum føroyingar.

PRENT?

…arbeiðsseðlar, álit, ársfrágreiðingar, ársroknskapir, blokkar, bløð, bóklingar, brævbjálvar, brævpappír, bøkur, faldarar, gávukort, gravsálmar, innbjóðingarkort, jólakort, klistrimerki, kvittanir, listabøkur, lógarsøvn, lutaseðlar, mappur, orðabøkur, plakatir, postkort, príslistar, produktbløð, putlispøl, rokningar, sanghefti, skreytbløð, takkarkort, visittkort (og nú er tíverri onki plás eftir, ring og spyr)…

Spf. HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

ROVER
D. B. Bilar
Tel. 310 600

TEKNIARBEIÐI
SMÆRRI UMVÆLINGAR
✔ Ráðgeving
✔ Húsatekningar v.m.
✔ Eftirlit
✔ Smærri umvælingar
✔ Uppmátingar
Gunnar M. Gregoriussen
*Húsasmiður - Byggifrøðingur*
Tel. 316302 og 221586
Sosialurin - 311820

Heilsøla av Turrum Fiski
Færafiskur



Eystara Bryggja Boks 3267 • 110 Tórshavn
Tlf./Fax 218603-318603

BINGO
*Fylg við í framtíðini – og nýt tað besta vit umboða:*
Bingoblokkar /øll sløg
Bingotrumlur v/ tilh.
El-bingomaskinur v/ skermi
Bingotýssar
Lutaseðlar
Merkiseðlar o.m.a.
BINGO IMPORT
Tel. 45 68 68
Fartel. 28 69 69
*Hvønn dag*
Sosialurin - 311820

ABS TRANSPORT
Vørukoyring í Føroyum.
Flyting úr Føroyum til Føroya.
Goymsla og flytikassar.
Tilboð verða givin.
Lagaligir prísir!
Tel. 31 12 00